# Skrásetingarlás



Talgild álop á netinum eru ein alsamt vaksandi trupulleiki, og føroyskar heimasíður eru onki undantak. Ofta royna ótangar at fáa atgongd til og broyta upplýsingar um eitt økisnavn, soleiðis at tann vitjandi verður leiddur til eina falska síðu, sum tú sum eigari av heimasíðuni ikki fært stýrt.

Hetta kann hava álvarsamar fylgir, so sum:

- Umdømið á tíni fyritøku verður verri
- Kundar missa álit á tíni fyritøku, og tykkara førleika at tryggja upplýsingar
- Mistar inntøkur frá kundum, sum ikki sleppa at keypa á røttu heimasíðuni
- Mistar upplýsingar og dátur, sum hava alstóran týdning fyri tína fyritøku, hetta kann vera brot á dátuverndarlógina

Fyri at verja tíni lykla økisnøvn, kanst tú sum skrásetari læsa økisnavnið fyri allari broyting í økisnavnaskrásetingini. Hetta kalla vit eitt Skrásetingarlás (Registry lock).

## Hvat er eitt Skrásetingarlás?

Skrásetingarlás er eitt eyka lás, tú setur á skrásetingina av økisnavninum. Á tann hátt verjir tú títt talgilda navn og samleika, so óviðkomandi ikki kunnu broyta tíni økisnøvn.

Tá títt økisnavn hevur Skrásetingarlás, er tað vart ímóti at:

- Óviðkomandi hava atgongd til tíni økisnavn
- Onkur av óvart ella við svik í huga broytir ella víðaristillar títt økisnavn
- Broytingar í DNS, ið ikki eru á skrá

Bert brúkarar við serligari heimild og góðkenning frá økisnavnaábyrgdaranum, kunnu gera broytingar í einum læstum økisnavni.

## Hvussu seti eg skrásetingarlás á míni økisnøvn?

Set teg í samband við okkum á okisnavn@okisnavn.fo og umbið eitt skrásetingarlás. Økisnavnaumsitingin tekur sær av restini.

## Hvat kostar tað?

Skrásetingarlásið er ein víðkan, sum allir brúkarar á Økisnavn.fo kunnu leggja afturat sínum økisnavni. Hevur tú ein skrásettan brúkara, leggja vit hesa trygdina oman á tey økisnøvn, tú ynskir at læsa.

Hetta kostar x um árið, og verður trekt samstundis sum endurnýggjanin av tínum økisnavni.